## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga sirm. Hitin millum 17 og 20 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin upp í hvassan vind og regn ella mjørki. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Kappróður í Keypmannahavn




*Hendan myndin av føroyskum kappróðri í Danmark, er tikin úr Ishøj*

Róðrarfelagið Knørrur á Sælandi skipar komandi leygardag 25. august fyri róðrarstevnu í Sydhavnini í Keypmannahavn. Hetta er fyrsta róðrarstevna, sum Knørrur skipar fyri og triði róður í samladu kappingini í Danmark ár. Regatta'in verður sett úti við tangan fyri endan av Sejlklubvej í Sydhavnini klokkan 13.30. 21 bátar hava meldað seg til róðurin, og hetta eru fyrireikarirnir sera væl nøgdir við, skrivar felagið Knørrur í tíðindaskrivi.

Fyrr í ár settu føroysku kappróðarfeløgini á flatlondum sær fyri at birta lív í aftur kappródurin í Danmark, eftir at tvær stevnur – Hirtshals og Brännö í Svøríki – vórðu avlýstar. Í tí sambandi vórðu fleiri tiltøk sett í verk. Eitt nú varð avgjørt, at øll feløgini skulu skipa fyri einari regatta hvør, at innføra eina stigskipan, so ein vinnari verður funnin fyri alt árið og at skipa fyri gallaveitslu, tá kappingarárið er liðugt.

Í tvey ár á rað hevur Knørrur, ið varð stovnað í 2002, eisini skipað fyri eini hugnaferð Sankt Hans-aften, har róð verður rundan um Amager. Byrjað verður í Hvidovre, har Knørrur heldur til og aftan á verður grillað við Sankt Hans báli í Hvidovre. Túrurin er slakar 10 tímar, og róð verður í fleiri holdum í fleiri bátum, sum fylgjast.

Aftan á róðurin leygardagin verður veitsla á Skarv, ið er opið sum vanligt frá midnátt og úteftir.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 10 |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 27 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 24 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 24 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 30 |
| Madrid | 36 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 27 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | |
| Sydney | 16 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 7 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1033 hPa. norðan fyri Azorurnar stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Føroya fer spakuliga í landsynning. Eitt lágtrýst, 1009 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Norður-Íslandi fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 5/8 kl. 06⁰⁰ – 6/8. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 5/8 kl. 06⁰⁰– 6/8 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 26,0 mm

# Flokkur vil stovna eitt ríkisráð

Eftir komandi fólkatingsval fer Sambandsflokkurin at virka fyri, at eitt ríkisráð verður sett á stovn. Í ríkisráðnum skulu sita føroyskir og danskir politikarar, og ráðið skal hava til endamáls at menna og styrkja ríkisfelagsskapin, og harvið vælferðina hjá føroyingum, skrivar Sambandsflokkurin í tíðindaskrivi.

Formaður í flokkinum, Kaj Leo Johannesen, sigur, at øll stig, sum higartil eru tikin á fullveldisleið, hava kostað í vælferð, og tí er umráðandi at styrkja ríkisfelagsskapin, soleiðis at eisini vælferðin hjá láglønarbólkunum verður tryggjað.

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august Mánin næstur jørðini
13. august Tendring
19. august Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. aug | 00.14 | 12.34 | 11.34 | 23.54 | 11.49 | - | 02.14 | 14.34 | 03.14 | 15.34 | 10.49 | 23.09 | 09.49 | 22.09 | 00.29 | 12.49 | 01.29 | 13.49 | - | 12.19 | 01.14 | 13.34 |
| 21. aug | 00.54 | 13.29 | - | 12.29 | 00.09 | 12.44 | 02.54 | 15.29 | 03.54 | 16.29 | 11.44 | - | 10.44 | 23.20 | 01.09 | 13.44 | 02.09 | 14.44 | 00.39 | 13.14 | 01.54 | 14.29 |
| 22. aug | 02.05 | 14.43 | 01.05 | 13.43 | 01.20 | 13.58 | 04.05 | 16.43 | 05.05 | 17.43 | 00.20 | 12.58 | 11.58 | - | 02.20 | 14.58 | 03.20 | 15.58 | 01.50 | 14.28 | 03.05 | 15.43 |
| 23. aug | 03.21 | 15.45 | 02.21 | 14.45 | 02.36 | 15.00 | 05.21 | 17.45 | 06.21 | 18.45 | 01.36 | 14.00 | 00.36 | 13.00 | 03.36 | 16.00 | 04.36 | 17.00 | 03.06 | 15.30 | 04.21 | 16.45 |
| 24. aug | 04.09 | 16.33 | 03.09 | 15.33 | 03.24 | 15.48 | 06.09 | 18.33 | 07.09 | 19.33 | 02.24 | 14.48 | 01.24 | 13.48 | 04.24 | 16.48 | 05.24 | 17.48 | 03.54 | 16.18 | 05.09 | 17.33 |